# Amariel og skiftandi ljós

**Mikladalur og skiftandi ljósið har er tema fyri framsýning hjá Amariel Norðoy, sum letur upp í Gallarí Fokus í dag**

LIST
*Eyðun Klakstein*

– Tað er nakað serligt við ljósinum í Mikladali. Tað er ikki sum her í Havn, her ljósið er rættiliga flatt. Í Mikladali er stórur kontrastur í ljósinum, og tað hevur í eini 30 ár verið útgangspunkt fyri verkum hjá mær, sigur Amariel Norðoy.

Hann hevur næstu tíðina framsýning á Gallarí Fokus í Havn, og her fer klaksvíkingurin í Havn at sýna fram 26 listarverk.

– Eg havi savnað verk, sum passa til hetta tema, sigur hann.

48 ára gamli Amariel Norðoy telist millum kendastu listarmenninar í Føroyum, og hann hevur havt eina ørgrynnu av framsýningum seinastu 30 árini.

Verk hjá honum hava verið á nógvum framsýningum uttanlands, og týdningurin av listinum hjá Amariel sæst millum annað aftur í, at fleiri bøkur eru skrivaðar um verkini hjá honum.

Framsýningin hjá Amariel letur upp í dag kl. 16.00, og hon hevur opið til 24. oktober.




*– Tað er nakað serligt við ljósinum í Mikladali, sigur Amariel Norðoy, sum hevur framsýning við Mikladali og skiftandi ljósinum har sum tema.*
*Mynd: Jens Kristian Vang*

## VEÐRIÐ



Petur Skeel Jacobsen, veðurfrøðingur greiðir frá um veðrið




**Veðrið í dag:**
Stívt andøvsgul upp í hvassan vind av útnyrðingi og ælingur, sum frálíður vátaslettingur, men eisini sólglottar. Hitin um dagin millum 8 og 11 stig – um kvøldið niður í 3 stig.




**Veðrið leygardagin:**
Fyrrapartin stívt andøvsgul upp í hvassan vind av útnyrðingi, seinnapartin minkar hann vindin niður í lot av ymsum ættum. Yvirhøvur turt og sólglottar og hitin millum 5 og 8 stig.




**Veðrið sunnudagin:**
Stívt andøvsgul upp í hvassan vind av landsynningi og suðri og stundum regn ella mjørki. Hitin millum 10 og 13 stig.

**Veðrið mánadagin og týsdagin:**
Gul til stívt andøvsgul av landsynningi og yvirhøvur turt og sólglottar, men mjørki í støðum. Hitin millum 9 og 13 stig.

### Hitalagið kring knøttin

| | |
|---|---|
| Illulisat | ÷2 |
| Nuuk | 1 |
| Qaqortoq | 3 |
| Ammassalik | 0 |
| Saint John's | 11 |
| Halifax | 15 |
| Reykjavík | 5 |
| Seyðisfjørður | 2 |
| Tórshavn | 7 |
| Lerwick | 9 |
| Aberdeen | 14 |
| London | 18 |
| Tromsø | 6 |
| Bergen | 9 |
| Oslo | – |
| Stokkhólm | 9 |
| Keypmannah. | 11 |
| Helsinki | 8 |
| Moskva | 13 |
| Berlin | 12 |
| Warzawa | 8 |
| Kiev | 7 |
| Bukarest | 9 |
| Paris | 12 |
| Madrid | 21 |
| Róm | 19 |
| Malorca | 25 |
| Athen | 18 |
| Malta | 23 |
| Tunis | 25 |
| Beijing | 16 |
| New Dehli | – |
| Bangkok | – |
| Jakarta | 31 |
| Sydney | 13 |
| New York | 21 |
| Miami | 28 |
| Los Angeles | 20 |
| Meksikobýur | 20 |
| Panama | 28 |
| La Paz | 16 |
| Rio de Janeiro | – |
| Buenos Aires | 21 |

### LUFTTRÝSTIÐ




Eitt djúpt lágtrýst, - ex »KATE« – 968 hPa. í útsynning úr Íslandi fer eystureftir og verður yvir Føroyum fríggjanáttina.




Lágtrýstið eystan fyri Hetland fer eystureftir og gevur eitt skifti kaldari veður á okkara leiðum. Ein hátrýstryggur yvir Íslandi verður yvir Føroyum leygardagin seinnapart.

### HITALAGIÐ




Hitalagið mált frá 08/10 kl. 06⁰⁰– 09/10 kl. 06⁰⁰. Hitin í gjár: 5,8°
Minsti hiti máldur í okt.: ÷4,0° Mesti hiti máldur í okt.: 18,4°

### AVFALLIÐ




Avfallið: 6,1 mm – mált frá 08/10 kl. 06⁰⁰–09/10 kl. 06⁰⁰
Avfallið higartil í oktober: 21,1 mm

…hvør sigur at vit eru sum onnur?

HESTPRENT Spf.

Dvørgastígur 7
100 Tórshavn
tel 31 45 55
fax 31 80 26
hestoy@hestprent.fo

## VESTFALLSKYRRINDI

10. oktober: Fullmáni
14. oktober: Mánin longst frá jørðini

Kelda. Álmanakkin 2003

| Dagur | Suðuroyar-/ Vágafirði fp. | sp. | Skúvoyar-/ Skopunarfirði fp. | sp. | Hestfirði/ Sundalagnum fp. | sp. | Vestmannasundi fp. | sp. | Mykinesfirði fp. | sp. | Nólsoyarfirði fp. | sp. | 2 fj. í LS úr Mjóvanesi fp. | sp. | Leirvíksfirði/ Haraldssundi fp. | sp. | Kalsoyar-/ Svínoyarfirði fp. | sp. | Hvannasundi fp. | sp. | Fugloyarfirði fp. | sp. |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 10. okt | 07.24 | 19.44 | 06.24 | 18.44 | 06.39 | 18.59 | 09.24 | 21.44 | 10.24 | 22.44 | 05.39 | 17.59 | 04.39 | 16.59 | 07.39 | 19.59 | 08.39 | 20.59 | 07.09 | 19.29 | 08.24 | 20.44 |
| 11. okt | 08.04 | 20.24 | 07.04 | 19.24 | 07.19 | 19.39 | 10.04 | 22.24 | 11.04 | 23.24 | 06.19 | 18.39 | 05.19 | 17.39 | 08.19 | 20.39 | 09.19 | 21.39 | 07.49 | 20.09 | 09.04 | 21.24 |
| 12. okt | 08.44 | 21.04 | 07.44 | 20.04 | 07.59 | 20.19 | 10.44 | 23.04 | 11.44 | — | 06.59 | 19.19 | 05.59 | 18.19 | 08.59 | 21.19 | 09.59 | 22.19 | 08.29 | 20.49 | 09.44 | 22.04 |
| 13. okt | 09.25 | 21.47 | 08.25 | 20.47 | 08.40 | 21.02 | 11.25 | 23.47 | 00.04 | 12.25 | 07.40 | 20.02 | 06.40 | 19.02 | 09.40 | 22.02 | 10.40 | 23.02 | 09.10 | 21.32 | 10.25 | 22.47 |

5 707265 100050 >